tíðindablaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyrritaksstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Randi Jacobsen, Törfinn Smith

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Telefon: 11820

Postadressa: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefax: 14720

Upphøgging og uttanumtos

Í FARNU viku viðgjørdu vit reglurnar fyri upphøggingargrunnin her í blaðnum. Tað var undanfarna landsstýri, ið fekk sær heimild at veita upphøggingarstuðul, eftir nærri ásettum reglum, sum løgtingsins fíggjarnevnd skuldi góðkenna.

REGLURNAR, sum undanfarna landsstýri ásetti í samráð við fiskivinnuumsitingina, vórðu góðkendar av táverandi fíggjarnevnd. Sostatt kundi undanfarna landsstýri játta upphøggingarstuðul eftir hesum reglum. Hetta varð eisini gjørt.

Í TEIMUm reglum, sum vóru galdandi, var ásett, at grunnurin kundi veita upphøggingarstuðul, ið svaraði til 80 pst. av prioritetunum og 80 pst. av aðrari skuld. Sitandi landsstýri hevur sett hesar reglur úr gildi. Nýggjar eru í umbúna. Nú skal upphøggingarstuðul veitast í mun til hvussu mong tons skipini hava veitt seinastu fimm árini.

Í BLAÐNUM seinasta hósdag loyvdu vit okkum at taka nøkur dømi fram. Hetta vóru dømi um skip, sum høvdu ligið í áravís og sostatt onki tons veitt seinastu fimm árini, men sum síðani vóru seld, sett í stand og gjørd út til fiskiskap av nýggjum. Dømini vóru frá tíðini áðrenn upphøggingargrunnurin varð stovnaður.

BÓÐU hesi skip um upphøggingarstuðul meðan reglurnar hjá undanfarna landsstýri vóru galdandi, vildu tey fingið upphøggingarstuðul og farið úr flotanum. Bóðu tey um upphøggingarstuðul eftir at reglurnar hjá hesum landsstýrinum koma at galda, vildu tey ikki fingið upphøggingarstuðul, men gjørt út til fiskiskap av nýggjum. Tey vildu komið innaftur sum veiðuorka.

ODDAGREININ seinasta hósdag hevur ført til nógv uttanumtos frá Paula Ellefsen í Dimmalætting leygardagin. Hann skuldsetur Javnaðarflokkin fyri at hava rikið vina- og kenningapolitikk. Sigur at tveir alment stuðlaðir toppmenn í Javnaðarflokkinum hava fingið upphøggingarstuðul o.s.fr. Hetta skrivingarlagið er Paula Ellefsen líkt.

SANNLEIKIN er, at allar umsóknir um upphøggingarstuðul verða fyrst viðgjørdar í eini serligari politiskt óheftari nevnd. Talan er um sonevndu serlánsnevndina. Í hesi nevndini situr eitt umboð fyri búskaparráðið, eitt fyri lønjavningargrunnin, eitt fyri privatu peningastovnarnar og tvey umboð fyri fiskivinnuumsitingina í Tinganesi. Henda nevnd sendir landsstýrinum tilmæli um at veita upphøgingarstuðul.

OKKUM dámar ikki uttanumtos. Ja, hetta sigur Pauli Ellefsen. Hann vil hava svar í sambandi við tær játtanir, sum undanfarna landsstýri veitti úr upphøggingargrunninum. Og her skal onki uttanumtos vera. Hann skal fáa eitt stutt og kontant svar.

ALLAR 14 tilsøgnirnar vórðu givnar eftir tilmæli frá serlánsnevndini. Tær vórðu givnar eftir reglum, ið vórðu ásettar av Føroya Landsstýri í samráð við fiskivinnuumsitingina og serlánsnevndina, og sum vórðu góðkendar av løgtingsins fíggjarnevnd.

AT enda ein áheitan á allar føroyingar: Næstu ferð, valhølini lata upp, gevið tá eina atkvøðu fyri, at tað meira enn 15 ára gamla uttanumtosið hjá Paula Ellefsen fær upphøggingarstuðul.

vj

Dimmalætting

Er Føroya Javnaðarflokkur veruliga so karrráur?

Í oddagreinini í Sosialinum seinasta hósdag, skrivað av vj (Vilhelm Johannesen?) gerðir Føroya Javnaðarflokkur frá teirra politikki, vánskiljandi upphøggingarstuðuli.

Beint áðrenn javnaðarmenn aftur stungu halan millum afturbeinini, og lupu frá allari politiskari ábyrgd, eins og teir gjørdu í 1980, gamlaðu teir teir nýggjar reglur fyri upphøggingarstuðul.

Í stórum skundi játtaðu teir út við 70 miljónir kr. til eigaratarnar av 14 fjeroyskum skipum.

Hesir skipaeigarar fingu til gávuts, upp undir leggingsvánlig 1998, játtað 80% av allari skuld, uttan mun til hvussu hesa skuld var ikomin.

Tað sum verri var, teir fingu upphøggingarstuðul uttan mun til um teirra skip høvdu fiskað nakað eftir fyri lønjavningargrunnin, eitt fyri privatu peningastovnarnar og tvey umboð fyri fiskivinnuumsitingina í Tinganesi. Henda nevnd sendir landsstýrinum tilmæli um at veita upphøgingarstuðul.

OKKUM dámar ikki uttanumtos. Ja, hetta sigur Pauli Ellefsen. Hann vil hava svar í sambandi við tær játtanir, sum undanfarna landsstýri veitti úr upphøggingargrunninum. Og her skal onki uttanumtos vera. Hann skal fáa eitt stutt og kontant svar.

AT enda ein áheitan á allar føroyingar: Næstu ferð, valhølini lata upp, gevið tá eina atkvøðu fyri, at tað meira enn 15 ára gamla uttanumtosið hjá Paula Ellefsen fær upphøggingarstuðul.

Pauli Ellefsen.

Gamlir dreingir og barnastyrkur.

Á tingi ganga bylgjurnar mangan høgar, og orðaskifti verður mangan hart og ótespiligt, men tað kemur meira enn so eisini fyri, at okkurt gullkornið er at finna.

Á tingfudninum týsdagin vóru tvey uppskot frá Sjálvsstýrisflokkinum til viðgerðar. Báðir sjálvsstýristingmenninir høvdu orðið, sum hvør í sínum lagi royndu at tala gott fyri uppskoti sínum. Lasse var ikki mjúkur í orðum inn á samgonguna, og hetta fekk millum annað Heina O. Heinesen, Kunoyartingmannin hjá Tjóðveldisflokkinum at taka orðið.

Eftir drúgv og hart orðastríð millum teir báðar um yvirtrekk og aðrar ólukkur kom tjakið inn á barnastyrkin.

Tá legði Niels Pauli Danielsen uppí. Hann kundi minni Heina á, at tað var milum annað Heina O. Heinesen at takka, at útreiðslurnar til barnastyrkin vóru størri, men undanfarna landsstýrið hevði ætlað.

Men hetta vildi Heini ikki rættiliga góðtaka.

-At geva einum gomlum dreingi skyldina fyri at drena landið fyri barnastyrk, var í hvussu er ikki eftir teirri reseptini, sum prestur vanliga prædikar, var Heini skjótur at svara, og meir skuldi ikki til at steðga hesum orðaskiftinum.

tór.-

Ikki eftir reseptini hjá presti...